# handVERKARIN

3. ÁRSFJÓRÐINGUR 2008 BLAÐ NR. 27 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# Lønar- og eftirlønarhækkingar

1. oktober 2008 fór tímalønin hjá sveinum úr 115,94 kr. upp í 118,29 kr.
Samstundis fór eftirlønargjaldið hjá sveinum úr 12 prosentum upp í 14% (2+12%)
Eftirlønargjaldið hjá lærlingum er 6,5%.

### Yvirtíðarlønir: 1. oktober 2008

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fyri fyrstu 4 tímarnar, vanlig løn | + | 35 % | 159,69 |
| Fyri næstu 3 tímarnar, vanlig løn | + | 60 % | 189,26 |
| Fyri fylgjandi tímar, vanlig løn | + | 100 % | 236,58 |
| Leygardag | + | 100 % | 236,58 |
| Sunnu- halgidagar og frídagar | + | 100 % | 236,58 |

### Limagjaldið

Limagjaldið er 450,- kr. um mánaðin.
Í hesum sambandi fara vit at minna á, at tað er umráðandi, at limagjaldið verður goldið til tíðina og, at ongin eftirstøða er.

Hetta hevur t.d. týdning fyri lívstryggingina. Allir limir eru lívstryggjaðir, men ein treyt fyri at fáa lívstrygging er, at limagjaldið verður goldið til tíðina.

### Fasta sjálvvirkandi flyting

Fyri at tryggja sær, at t.d. lívstryggingin altíð er galdandi er best at gjalda limagjadið við fastari/sjálvvirkandi flyting.

Limir kunna ringja til skrivstovuna (tlf. 35 48 00) og boða frá, at teir ynskja fasta/sjálvvirkandi flyting, og hvørja bankakonto limagjaldið skal gjaldast av.
Hesin nýggi møguleikin hevur samband við umlegging frá PBS til Gjaldsskipanina hjá Elektron.

Avgreiðslutíðirnar á skrivstovu okkara eru vanligar dagar frá kl. 9-12, og hósdag frá kl. 15-18

## Innihald


Lønar- og eftirlønarhækkingar 2
Aðalfundur í Landsfelag Handverkaranna 3
Eitt lív sum bilmekanikari 4



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag • Sjúrðargøta 20 • Box 203 • 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media • **Umbróting og prent:** Gramar
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 • Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo

# Aðalfundur í Landsfelag Handverkaranna

Landsfelag Handverkaranna hevði aðalfund á Hotel Føroyum 4. september. Nógv var á skránni; byrjað varð kl. 10, og hildið varð á til kl. 16.



*Danjal Pauli Djurhuus formaður í Landsfelagnum.*

Tá fundurin var settur, greiddi nevndin fyrst frá virksemi felagsins farna árið.

Í hesum sambandi varð greitt frá teimum fundum, sum Landsfelag Handverkaranna – saman við øðrum fakfeløgum – hevði við landsstýrið, tá talan var um at broyta mannagongdina viðvíkjandi útlendingum, sum koma til Føroya at arbeiða. Í málinum liggja fleiri stórir trupulleikar, m.a. tað, at útlendingar,

**Framhald á síðu 25**

*Fundarluttakarar frá vinstru: Hanna Michelsen, Martin Øster, Emil Michelsen, Sofus Hansen, Høgni Hovmann, Eli Brimsvík, Johannus Bertelsen, Eliesar Rasmusen, Danial Pauli Djurhuus og Janus Uldall.*



# Eitt lív sum bilmekanikari

**Í 1957, tá Karl Wolles var 16 ára gamal, hevði hann sett sær fyri at royna at sleppa í bilmekanikaralæru. Men tað var kortini lættari sagt enn gjørt. Tá vóru ikki nógv bilverkstøð og lærupláss í Havn. Og helst høvdu eisini fleiri aðrir ungir dreingir somu ætlan sum hann. Karl visti, at Sverri Djurhuus hevði bilverkstað í Tjarnastovu við R. C. Effersøegøtu, men hann kendi ikki Sverra; visti bara hvør hann var.**



So ein dagin møtir Karl Sverra Djurhuus niðri í býnum. Tá mannaði hann seg upp, og spurdi um hann ikki kundi sleppa í læru hjá honum. Karl visti um aðrar dreingir, sum høvdu spurt Sverra um lærupláss, men tað hevði ikki eydnast, so vónirnar vóru tí kanska ikki tær allarbestu.

Men hvat, tað óvæntaða hendi, Sverri segði – alt fyri eitt - ja tað er í lagi. Karl gjørdist sjálvandi ovurfegin og vildi sleppa til arbeiðis skjótast gjørligt.

Men sjálvandi skuldi fyrst ein lærusáttmáli undirskrivast; tað var fingið uppá pláss 1. juni 1957, so tá byrjaði eg at læra, greiðir Karl frá.

Karl var tann fyrsti bilmekanikaralærlingurin hjá Sverra Djurhuus, men stutt eftir kom ein annar drongur, Hilmar Johannesen, eisini í læru. Hilmar og Karl gjørdust bestu vinir og eru tað enn, tann dag í dag.

## Lærumeistarin

Nógv var at gera á verkstaðnum hjá Sverra Djurhuus, og í 1958 flutti hann verkstaðið úr Tjarnastovu oman í Rættará.

Karl sigur, at hann dámdi sera væl at arbeiða saman við Sverra. Hann var ein góður lærumeistari og arbeiðsgevari, og vit riggaðu væl saman.



*Karl saman við lærumeistaranum Sverra Djurhuus og Hilmar Johannesen, sum eisini lærdi til bilmekanikara hjá Sverra.*

Sverri plagdi at minna Karl á tann dagin, tá ið teir hittust fyrstu ferð. Sverri segði altíð, at hann kundi ikki siga nei, tá hann sá henda fitta drongin, sum so gjarna vildi sleppa at læra til bilmekanikara. Hann hevur helst sæð, at eg brendi fyri sakini, sigur Karl skemtandi. Eg havi ongantíð angra, at eg fór í bil mekanikaralæru, mær hevur dámt væl at arbeiða sum bilmekanikari, so eg kundi ikki hugsað mær annað.

## Tekniski skúlin

Tríggjar teir fyrstu vetrarnar var Tekniski skúli burturav kvøldskúli.

Undirvísingin var á VBV; tað var í skúlastovunum hjá Studentaskúlanum. Karl sigur, at tað kundi onkuntíð vera eitt sindur tungt at fara í kvøldskúla aftaná ein strævnan arbeiðsdag. Men tað gekk, vit høvdu góðar lærarar, tað hevur so nógv at siga.

Tað fjórða árið gjørdist nógv lættari tí, tá var Tekniski Skúli fluttur í gomlu húsini hjá Føroya Banka í Tórsgøtu; og tá var øll undirvísingin um dagin. Tað seinasta skúlaskeiðið var 6 vikur út í eitt.

Karl sigur, at hann bara hevur góð minnir frá skúlanum, tí har vóru góðir lærarar. Hann minnist serliga Ziska, ið var skúlastjóri, og eisini Børga Nielsen, Einar Mikkelsen, Rikard Long og Daniellu Olsen.

## Sveinastykkið

Tá lærutíðin, 4 ár, var um at vera liðug fekk eg at vita, at eg kundi fyrireika meg í ein mánað áðrenn eg skuldi gera sveinastykkið. Tá fekk eg eisini at vita, at eg skuldi taka ein bilmotor sundur, skifta allar slitdeilir, slípa ventilar, reinsa allar deilir og seta motorin saman aftur og í bilin. Tað gekk rímiliga væl. Í sveinabrævinum stendur orðarætt "Sveinaroynd sum bilmekanikari, sum var motorumvæling". Cornelius Reinert og Sverri Mortensen vóru "skuemeistarar", teir arbeiddu báðir hjá Vilhelm Nielsen.


FØROYA LÆRURÁÐ

kunnger, at ár 1961 24. april sýndi

Karl Wolles

føddur 16. juni 1941

í Klaksvík

sveinaroynd sum bilmekanikari

sum var motorumvøling.

Sveinaroyndarnevndin hevur eftirkannað og góðtikið royndina.

Læruráðsins vegna:

FØROYA LÆRURÁÐ

R. Long

Formaður.

*Lærubrævið hjá Karl er dagfest 24. apríl 1961; viðmerkt er, at "Sveinaroyndarnevndin hevur eftirkanað og góðtikið royndina." Rikard Long hevur skrivað undir.*

Eg var sjálvandi fegin, tá eg stóð við sveina-brævinum í hondini, hetta hevði verið ein góð tíð hjá mær.

## Havnar Handverkarafelag

Nú var mann so umsíðir vorðin sveinur, og fekk limaskap í Havnar Handverkarafelag. Tað var ein stórur dagur. Eg havi verið limur í Havnar Handverkarafelag øll árini og eri tað enn. Lat meg skoyta uppí her, at tað hevur stóran týdning, at hava góð fólk í nevndini, og eg havi hug at nevna her, at nevndin í Havnar Handverkarafelag, sum hevur sitið seinastu árini, hevur fingið nógv gott av skafti. Eg hugsið t.d. um Eftirlønargrunnin. Nú er Eftirlønargrunnurin so nýggjur, og eg eri í tí elsta endanum, so tað bleiv sjálvandi avmarkað, hvat eg kundi fáa í eftirløn, men eg eri kortini glaður og takksamur fyri tað, sum eg fái. Karl nevnir í hesum sambandi, at tá hann 16. juni í ár gjørdist 67, fekk hann útgoldið 80.000 kr. frá Havnar Handverkarafelag. Upphæddin var skattafrí, so tað kom sera væl við. Sjálvur haldi eg, at hetta hevur stóran týdning, tá man røkkur eftirlønaraldur, – ikki minst hjá mær, sum vegna sjúku var vorðin óarbeiðsførur.



## Hans Jóhannes Clementsen



Árini 1961-62 arbeiddi Karl á bilverkstaðnum hjá Hans Jóhannes Clementsen í Lucas Debesargøtu.

Har arbeiddu teir mest við Fólkavognum, VW-bilum, sum teir eisini verða nevndir. Tá hevði Farodane umboð uppá Fólkavognar, men teir høvdu fasta avtalu við Hans Jóhannes um at taka sær av viðlíkahaldi og umvælingum.

Tá vóru nógvir Fólkavognar í Føroyum, eg minnist, at Marinustøðin og støðin í Mjørkadali høvdu nógvar Fólkavognar, so har var altíð nógv at gera.

Karl greiðir okkum frá, at hjá Hans Jóhannes arbeiddi hann nógv saman við Jentoft, sum var norðmaður; hann var altíð blíður og fyrikomandi, og var ofta góður í ráðum. Men har vóru eisini yngri menn, sum vóru um mín aldur: Gisli Rasmusen, Símin Pauli í Dali og Hjalmar Reynstind.




## Hjá Vilhelm Nielsen

Í januar 1963 fekk Karl starv hjá P/F Vilhelm Nielsen, sum hevði stóran bilverkstað í Jónas Broncgøtu í Havn. Vilhelm Nielsen umboðaði GM-bilarnar, Opel, Vauxhall og Bedford. Hann seldi eisini lastbilar.

Í hesum starvi kom Karl at ferðast nógv kring landið; hann varð sendur út á bygdirnar at gera eftirlit og umvælingar av Opel, Vauxhall og Bedford bilum. Tá kom hann í samband við nógv fólk um alt landið; hann hitti fólk, sum eru vorðin vinfólk, sum hann enn hevur samband við. Tá vóru ikki so nógv amboð av øllum møguligum slag, sum í dag, og tað var sjálvandi avmarkað, hvat ferðagóðs møguligt var at hava við um alt landið, tá í tíðini. Regluligt ferðasamband, sum vit í dag taka sum givið, var lítið av tá.

Karl fortelur, at Vilhelm Nielsen plagdi skemtandi at siga við hann "Du skal bare se




*Karl arbeiddi tvey tíðarskeið í Grønlandi. Henda myndin er tikin á amerikansku herstøðini í Syðra Streymfjørðinum, har Karl arbeiddi eitt tíðarskeið í 1967-68.*

klog ud", og um hann onkuntíð stóð fastur og arbeiði ikki gekk eftir vild, so skuldi hann bara ganga sær ein túr, so fór alt at laga seg. Tað vóru góð ráð, leggur Karl afturat.

Karl arbeiddi hjá Vilhelm Nielsen fram til 1970, burtursæð frá tveimum styttri tíðarskeiðum.

## Bilmekanikari í Grønlandi

Karl greiðir okkum nú frá, at hann í sekstiárunum var tvey tíðarskeið í Grønlandi. Fyrra ferðin var í 1965. Tá var eg 7 mánaðir í Christianshåb, og arbeiddi sum bilmekanikari hjá Grønlands Tekniske Organisation.

Seinnu ferðina var eg í Syðra Streymfjørðinum. Tað var í 1967-68; tá arbeiddi eg á basanum hjá amerikanarunum. Har var nógv umvælingararbeiði; arbeiðið hjá mær var serliga at umvæla stórar tangabilar, men har var eisini vanligt bilmekanikaraarbeiði. Ta ferðina var eg burtur í 8 mánaðir.

## Shellstøðin á Frælsinum

Shellstøðin á frælsinum, sum opnaði í 1970, var fyrsta støðin av sínum slag í Føroyum.

Nú eru tær nógvar í tali. Tað sum var nýtt tá var, at tey seldu kioskvørur og smærri lutir til bilar. Har var eisini tann fyrsta vaskimaskina til bilar, og eitt lítið verkstað til smærri umvælingar, olju- og dekkskifti. Tað var alt nakað nýtt, sum ikki hevði verið frammanundan í Føroyum. Har arbeiddi Karl sum bilmekanikari árini 1970-1973.

Har var gott at arbeiða, sigur Karl, serliga tí, at har vóru billyftir, so man slapp frá at fara niður í eina grøv, ella leggja seg á ryggin niður á gólvið, tá arbeiðast skuldi undir bilinum. Hetta var eisini nakað nýtt.



*Gamlir gønlandshundar, ið hava tænt fyri seg, verða avlívaðir og hongdir upp. Skinnið verður m.a. brúkt til grønlendska tjóðbúnan.*




*Karl hevði egið bilverkstað árini 1973-1986 í Stoffalág.*

## Verkstað í Stoffalág

Í 1973 gjørdi Karl av at royna seg við egnum bilverkstaði. Hann hevði eitt hampiligt bilhús í Stoffalág, sum hann innrættaði sær til bilverkstað. Hann hugsaði sær, at tað var grundarlag fyri einum verkstað, sum veitti nøkulunda somu tænastu sum Shellstøðin á Frælsinum, har hann hevði arbeitt frammanundan. Hann ætlaði sær ikki at gera stórar umfatandi umvælingar.

1. oktober 1973 var hann klárur at taka ímóti tí fyrsta kundanum.

Hetta vísti seg skjótt at vera ein skilagóð avgerð. Hann fekk skjótt nógvar fastar kundar. Karl sigur, at tá man hevur arbeitt so longi í fakinum sum eg, so er man komin at kenna so nógv fólk. Tá hevur man eisini arbeitt fyri nógv fólk, og um fólk eru nøgd við tað, sum man hevur gjørt, so koma tey aftur og gerast fastir kundar.

Tað hevur alt at siga fyri ein bilverkstað.



*Pápi Karl, Jóhan A. P. Wolles av Trøllanesi og mamman Signhild f. Jensen av Strondum.*



*Foreldur og systkin fyrst í fimtiárunum. Tær tríggjar systrarnar eru Jóna, Agnes og Kirstin.*

## Bileftirlitið og Maskinskúlin

Í 1986 lýsti Bileftirlitið, sum í dag hevur navnið Akstovan, eitt starv leyst. Karl lat eina umsókn inn, og var settur í starv hjá Bileftirlitinum 1. juli 1986. Hetta arbeiði dámdi honum væl. Tá hann, 1. oktober 2001, gavst hjá Bileftirlitinum hevði hann arbeitt har í 15 ár.

Eftir tað hevði Karl ymisk fyrifallandi arbeiði sum bilmekanikari. Seinna part av 2003 átók hann sær eitt avloysarastarv hjá Maskinskúlanum, tað sum eftir var av árinum.

Hetta skuldi seinni vísa seg at gerast seinasti partur av drúgvu og virkisfúsu leiðini hjá Karl í føroysku "bilbransjuni".

## Hjartatrupulleikar

Karl greiðir okkum nú frá, at hann fyrst í januar 2004 kendi seg illa til passar í fleiri dagar. Sjálvur helt hann, at tað mátti vera okkurt slag av influensa; men tá ið einir 14 dagar vóru farnir gjørdist støðan verri; hann fór at balla við tunguni. Tá gekk tað upp fyri honum, at talan var ikki "bara" um influensa, og fór tí til lækna.

Tá blóðtrýstið varð kannað vísti tað seg at vera alt ov høgt. Læknin var púra greiður í síni søk; blóðtrýstið var so mikið høgt, at eg skjótast gjørligt mátti út á Landssjúkrahúsið. Karl var innlagdur, og fekk hjartamedesin, sum rættuliga skjótt bøtti um støðuna. Men kropsliga bleiv eg kortini ikki tann sami aftur,



*Karl og Kalmar Lindenskov á rossabaki fyrst í fimtiárunum.*

sigur Karl. Til dømis orkaði eg illa at ganga móti brekku.

Tá søgdu læknarnir eisini, at best var at leggja meg undir skurð, og geva mær eina sokallaða “balón”. Hetta var gjørt á Ríkissjúkrahúsinum í mars 2004. Tá fekk eg eisini at vita, at eg ikki skuldi rokna við at gerast arbeiðsførur aftur. Hóast skurðviðgerðin á Ríkissjúkrahúsinum eydnaðist væl, so mátti eg venja meg við, at eg var vorðin “fyritíðarpensiónistur”, fekk eg at vita.

## Fyritíðarpensjonistur

Karl legðist kortini ikki á ta løtu síðuna; hann gjørdi alt tað hann var mentur fyri at bøta um støðuna. Hann greiður okkum frá, at hóast hann kendi sína støðu væl, so var tað ein hvøkkur, tá hann ein morgunin merkti, at alt ikki var sum tað plagdi.

Hetta var 27. juli 2007; tá eg skuldi reisa meg upp í songini, legði eg til merkis, at vinstra bein ikki skikkaði sær sum tað átti. Eg ringdi tí til kommunulæknan um morgunin og fekk tíð sama dag. Tað ferðina gekk tað eisini skjótt fyri seg; eg bleiv alt fyri eitt sendur út á Landssjúkrahúsið og var innlagdur.

Tá fekk eg at vita, at eg hevði haft ein blóðpropp, og støðan var ikki góð. Eg var so mikið lamin í mjødnini, at eg mátti fáa fysioterapi í fleiri mánaðir. Ikki fyrr enn 4. desember 2007 var støðan so mikið fræ, at eg var útskrivaður. So tað ferðina var eg á Landssjúkrahúsinum í umleið 5 mánaðir. Tá var støðan sjálvandi nógv betur, men vinstra bein bleiv ikki heilt gott aftur, og tí merki eg til tað enn.

Men eg royni at halda meg í form, eg eri í Svimjihøllini næstan hvønn tann einasta morgun. Og so eri eg javnan í Yndi og venji, man má ikki missa móti, man má arbeiða fyri sakini, sigur Karl álvarsamur.



*Karl saman við konu og børnum. Børnini eru frá vinstru: Elsebeth Maria, Jóhan og Signhild.*

## Bakgrundin

Karl er føddur í Klaksvík 16. juni 1941, so hann gjørdist 67 ára gamal og pensionistur 16. juni í ár.

Pápin, Jóhan Andrias Petersen Wolles, var av Trøllanesi. Foreldur hansara vóru Rosenmeyer Wolles av Trøllanesi, og Katrinu Olsen, sum var av Toftanesi í Leirvík.

Mamman, Signhild, var dóttir Jógvan Jensen av Strondum, og Agnas F. Nicolajsen, sum var úr Havn.

Jógvan Jensen keypti sær eftirnavnið á Dul, og øll tey, sum hava eftirnavnið á Dul eru eftirkomarar hansara.

Foreldrini giftust í Klaksvík í 1935. Tað fyrstu tíðina búðu tey í Klaksvík, pápin arbeiddi hjá Kjølbro og mamman var telefondama. Mamman hevði dupultan mjadnafeil, so hon var illa gongd. Hon var løgd undir skurð í Danmark í 1947, og plagdi sjálv at siga, at tá slapp hon av við pínuna, men var framvegis illa gongd.

Karl hevur tríggjar systrar: Jóna og Agnes búgva í Havn, og Kirstin í Týsklandi.

Tey fyrstu árini búði familjan í Klaksvík; men flutti til Havnar í 1942.

## Fyrstu árini í Havn

Tá vit spyrja Karl, hvussu barnaárini vóru, greiðir hann fyrst frá, at hann var einans um eitt ára gamal, tá tey fluttu úr Klaksvík til Havnar. So hann minnist, av góðum grundum, ikki nógv tey allarfyrstu árini í Havn. Ta fyrstu tíðina búðu tey í Tvørgøtu; tá var pápin lossingarmaður á Eystarubryggju. Seinni búðu tey í C. Pløjensgøtu. Í 1947 fluttu tey í Janstovugøtu. Í 1948 fór Karl í barnaskúla; hann gekk øll 7 árini í Gamla Kommunuskúla, bygningurin, sum í dag er Ráðhús í Havn. Man kann siga, at tá var bert eitt hanagleiv millum heim og skúla. Tí var tað ein stór broyting, tá tey, fyrst í fimmtiárunum, fluttu heilt út í uttasta Havnardal at búgva.

## Í Havnardali

Karl greiðir okkum nú frá, at undir seinna heimsbardaga bygdi Jákup á Dul stór hús við fjósi til fleiri neyt og garð til 300 hønur úti í Havnardali. Húsini stóðu uttanfyri rossafjósini, sum nú eru í Havnardali. Har var stórt dyrkað lendi, og nógv at hoyggja til neytini. Har vóru tveir súrhoyggjabrunnar; og her er vert at skoyta uppí, at tá var súrhoyggj rættuliga




## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkararbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · articon@articon.fo · www.articon.fo




SPEKT stataut.revisorar Spf.
spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

Staravegur 17 · Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34 · Faks 34 34 35
Heiðavegur 15 · Postsmoga190 · 600 Saltangará · Tel 474 474 · Faks 474 475

SPEKT statsaut. revisorar



Elsa og Karl avmyndaði, tá Karl fylti 65 ár.

óvanligt fóður í Føroyum. Tá í tíðini var mest sum alt hoyggj turkað uppá tann gamla mátan í Føroyum.

Fyrst í fimmtiárunum átók pápi Karl sær at reka henda garðin fyri Jákup á Dul. Har búðu tey í 3 ár, og tí hevur Karl nógv góð minnir úr Havnardali.

Pápin hevði fasta avtalu við Landssjúkrahúsið, sum fekk mjólk og egg frá teimum.

Bilur kom hvønn morgun út í Havnardal eftir mjólk og eggum. Við hesum bilinum slapp Karl hvønn morgun til Havnar, tá hann skuldi í skúla. Men verri var at sleppa út aftur í Havnardal eftir skúlatíð, tað tók ein heilan tíma at ganga úr Havnini út har, sum tey búðu.

Annars var so mikið nógv arbeiði á garðinum, at pápin mátti hava ein mann at hjálpa sær, og Karl minnist, at Andrias Danielsen úr Syðradali, búði hjá teimum og arbeiddi saman við pápanum. Karl greiðir frá, at tey fingu høsnarungar frá Jens Reinert, sum búði á Villingardalsvegnum. Minnist meg rætt, so hevði hann klekingarmaskinu.

## Rossini

Karl fortelur, at tey høvdu eisini ross í Havnardali, og tað hevði nógv at siga fyri hann. Honum dámdi væl at vera um rossini, og gera túrar á rossabaki. Hann minnist, at hann mangan fór langar ríðitúrar t.d. til Syðradals, Velbastaðar ella Kirkjubøar. Til Havnar fór man ikki á rossabaki. Tað besta var, at foreldrini høvdu álit á honum, og lótu hann sleppa hesar longu túrarnar. Tá gerst man meira sjálvbjargin, sigur Karl. Tað vóru eisini aðrir dreingir í Havn, sum dámdu at fáast við ross. Karl nevnir, at hann og Kalmar Lindenskov vóru mangar góðar túrar saman. Onkuntíð var hann eisini saman við Odduri Niclasen á rossabaki.

## Úti á bygd

Karl var eisini nógv úti á bygd og ferðaðist, tá hann var smádrongur. Av tí at pápin var av Trøllanesi var sambandi við tey, sum búðu á Trøllanesi gott. Har búðu ikki nógv fólk, men tey stóðu væl saman, tey løgdu nógv í at hjálpa hvørjum øðrum. Tað var helst eisini neyðugt um man skuldi yvirliva á einum plássið, sum lá so avsíðis.

Á Trøllanesi vóru 4 hús, tá Karl var smádrongur: Innistova, Uppistova, Útistovu og Nýggja stova.

Abbi Karl, Christian Rosenmayer Wolles, var føddur á Trøllanesi í 1864. Hann hevði



*Karl hevur altíð dámt væl at vera saman við familjuni á Trøllanesi.*

óðalsjørð, onga kongsjørð. Pápabeiggin, Óli Wolles, tók við eftir abban. Men av tí, at bygdin lá so avsíðis, og lívið har mangan var hart, so ivaðist pápabeiggin longi um hann skuldi taka yvir. Tað var um tað tíðina, tá ein viti varð settur upp norðast á Kalsoynni. Tá vitin var uppsettur spurdu teir Óla um hann ikki kundi røkja og hava eftirlit við vitanum. Óli játtaði, og varð búgvandi á Trøllanesi. So vitin hevur eisini haft fíggjarligan týdning fyri bygdina.

Karl sigur, at hann hevur nógv góð minnir av Trøllanesi, har vóru góðar umstøður hjá børnum at spæla, men tað var eitt sum tey ikki máttu, tey máttu ikki fara oman á lendingina uttan at vaksin vóru við. Sonur pápabeiggjan, Helgi og eg eru javngamlir; vit vóru altíð saman, man kann siga, at sá man annan, so sá man báðar.

Tá var eisini skúli á Trøllanesi, og tá Karl ta einu ferðina var 7 mánaðir - út í eitt – har norðuri, gekk hann eisini í skúla har eitt skifti. Karl minnist, at um líkindini vóru hampilig, so kom postbáturin norð á Nes tríggjar ferðir um vikuna; týsdag, hósdag og leygardag. Tá var man oftast fúsur, saman við teimum vaksnu, á lendingini.

Karl hevði eina fastir á Eiði, og tí var hann eisini mangan á Eiði og ferðaðist.

Umhvørvið á bygd var – á mangan hátt – nógv øðrvísi enn í Havn; tað mundi vera tað sum dró, sigur Karl.

## Konu úr Klaksvík og trý børn

Kona Karl, Elsa, er ættað úr Klaksvík, f. Sivertsen. Tey giftust í 1970. Tá hevði Karl bygt hús í Stoffalág, har tey enn búgva.



*Vitin norðast á Kallsoynni hevur haft stóran fíggjarligan týdning fyri Trøllanes. Hann hevur verið røktur av Nesmonnum; tann fyrsti vitapassarin var Christian Rosmeyer Wolles, pápabeiggi Karl.*

Børnini eru trý: Jóhann (37 ár), Elsebeth Maria (33 ár) og Signhild, sum er 26.

Sonurin Jóhann hevur valt sama yrki sum pápin. Hann lærdi til bilmekanikara hjá Reyni Service, og arbeiðir nú hjá VR-bilum. Elsebeth Maria býr í Danmark, hon arbeiðir á Hotel Bethel í Keypmannahavn.

Signhild, sum býr í Sørvági, valdi eisini bilheimin; hon lærdi á eykalutagoymsluni hjá Derek Brockie, og arbeiðir nú hjá AMA í Havn.

Karl og Elsa eiga 3 barnabørn.

## Skipar Hansen

Her fara vit eisini at nevna, at oldurabbi Karl Wolles var Christian Rosenmeyer Wolles (1811-1857). Hann var sonur Peder Hansen Wolles, sum vanliga verður nevndur Skipar Hansen (1745-1817).

Skipar Hansen var giftur tvær ferðir, og sonurin Rosenmeyer, sum hann varð kallaður, var næstyngstur av børnunum í seinnu giftu.

Hesin Rosenmeyer var eina tíð húskallur á Viðareiði, har hann eisini varð konfirmeraður, men í 1828 flutti hann norður á Trøllanes at búgva saman við einum viðingi, sum festi garðin í Útistovu á Trøllanesi sama árið.

Í 1833 giftist Rosenmeyer – sonur Skipar Hansen – við Maluni, sum var tann yngsta bóndadótturin í Innistovu. Tey bæði fluttu inn í roykstovuna í Uppistovu, sum tá hevði staðið tóm í nøkur ár. Rosenmeyer og Malan fingu 7 børn.

Jóhan Wolles, pápi Karl, var 4. ættarlið eftir Rosenmeyer hjá Skipar Hansen, sum búsettist á Trøllanesi. Forfedrarnar hjá Karl hava búð í Uppistovu á Trøllanesi, til tann triði Christian Rosenmeyer Wolles doyði í 1996.

## Ryberg og navnið Rosenmeyer

At ein sonur Skipar Hansen fekk sermerkta navnið Rosenmeyer hevur samband við eitt áhugavert tíðarskeið í Føroya søgu.

Hetta tíðarskeið byrjar í 1767, tá danski stórkeypmaðurin Niels Ryberg fekk loyvi at hava eina umskipingargoymslu í Vágsbotni í Havn í 20 ár.

Endamálið var, at smugla hjálandavørur til Bretlands, sum um hetta mundið royndi at fíggja krígsførsluna móti Fraklandi m.a. við høgum innflutningsgjøldum. Hesi viðurskifti góvu smuglarum stórar møguleikar. Oyggin Man hevði verið eitt sovorðið smuglarabøli, men í 1765 var ólógligur handil haðani steðgaður.

Nakrir av monnum Rybergs í Føroyum




# Lat heldur okkum gera tað...

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

**...húsavarðaarbeiði**
**...alt snikkara- og timburarbeiði**
**...umvælingar**
**...sethúsabygging**

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

**Húsavarðartænastan**

**Ognað tær tín egna húsavørð**

Málarameistararnir
**FALKENBERG**
Tlf. 21 31 51 Tommy
Tlf. 21 31 54 Benny





*Vestaravág síðst í 18. øld. Málað hevur Christian Rosenmeyer, ið var ein av fyristøðumonnunum í Rybergs handli.*

høvdu royndir sínar í hesum serliga handilshátti við Man.

Fyristøðumenninir í Rybergshandli vóru Christian Rosenmeyer og Urbanus Otto Floor. Hesin Christian Rosenmeyer og Skipar Hansen gjørdust vinmenn, og tað er onki at ivast í, at tað er orsøkin til, at Skipar Hansen gav einum soni navnið Rosenmeyer.

Seinni vórðu fleiri føroyingar nevndir Rosenmeyer.

Handilin, sum Ryberg hevði í Vágsbotni, hevði ikki loyvi at handla við føroyingar. Kongur skuldi hava eitt prosent av útflutningsvirðinum. Vørurnar, sum lagdar vórðu upp í Vágsbotni, vóru serliga romm, te, ginn, cognac, genever og tubakk, og tær komu oftast til Føroya við skipum hjá Ryberg sjálvum ella við amerikonskum ella norskum skipum, og ensk, skotsk og írsk skip fluttu tær loyniliga inn í Bretlandi, Skotlandi og Írlandi. At hetta var virksemi við lít, skilst av, at við hvørt kundu

**Framhald á síðu 24**



*Vestaravág og Høgareyn. Gamla kirkjan og Munkastovan uttast t.h. Málað hevur Christian Rosenmeyer.*


mazda
Tann nýggi 6'arin er komin
SENDISTOVAN
ZOOM-ZOOM
mazda 6
Bilasølan
www.mazda.fo


TEAMES
FØROYA GASSØLA
Veitari av gasstøkni og útbúnaði
AGA
bp
ESAB
Føroya Gassøla · Akranesgøta 2 · Tórshavn · Tel 31 55 44, Fax 31 17 06


www.euronom.se
EURONOM
Hiti úr náttúruni
FlexiFuel er ein av heimsins bestu upphitingarskipanum til hús
Við FlexiFuel skipanini ber til at kombinera eina ella fleiri orkukeldur
Ársins Annlegg! Svenska Sólorku-felagið
ExoSol OPC
Vakumrør sólfangari. Ókeypis orku megin-partin av árinum! Nýggi vakumrørsólfangarin EU21 við innbygdum sólkyknum, framleiðir el til sirkulatiónspumpuna, sum sjálv regulerar maximumnýtsluna.
ExoAir
Rustfrí luft-/vatnpumpa. Gevur hita niður á - 25° og heitt vatn upp til +60°. Fekk gullheiðursløn á „Eneo Energie" størstu orkumessuni í Fraklandi í 2007.
ExoFlame
Brenniovnur, ið eisini kann bindast í tangan.
Exo Tangi VPS
Euronom Flexi Fuel er ein av heimsins bestu Agenda 21-upphitingarskipanum til hita í húsum. Hjartað í skipanini Exo Tank VPS, verður settur til sólfangarar, hitapumpur, oljufýr ella ta orkukeldu, mann frammanundan hevur. Við Flexi Fuel-skipanini kann mann velja at brúka ta upphitingarskipanina, sum mann ynskir, alt eftir hvat er bíligari.
Hiti
Alt rør og sanitet arbeiði verður gjørt
FlexiFuel
Stoffalág 33 · Tórshavn · tel. 315008 · fax 315009 · hiti@post.olivant.fo · www.hiti.fo
foroyaprent.fo


Gott handverk, skjót tænasta
Stephanssons Hús
SKIPASMIÐJAN
www.faroeyard.fo

alka

einføld trygging

ALKA - Engelholm Allé 1 - Høje Taastrup - 2630 Taastrup - Danmark

XL BYG Balslev.fo




www.balslev.fo

# Ídnaðar- og garaguhurðar

**Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92**

**Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður**

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn




VARTA
THE BATTERY EXPERTS

## Battariir Til Øll Endamál

Fartelifonir

Hoyri Apparatir

Ur og mangt annað

Eisini hava vit øll vanlig battariir



**Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prísir**

**PÓLAR**

Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67 fartel. 21 28 60

**elmek**

v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo

*Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl*


DELL
HEWLETT PACKARD
SONY
Canon
Vit hava alt til skrivstovuna
Og meira afturat …
city
www.city.fo
Tórshavn
347 300
Klaksvík
347 310
Saltangará
347 320



*Tarvasteinur, uppi á Hálsi, har Skipar Hansen fjaldi seg fyri Brillumanninum, ið kravdi at fáa ein staðkendan skipara umborð.*

upp í 14 skip liggja á Havnini, og okkurt árið kundu skipini, sum komu við ella eftir vøru, vera um 50 í tali. Nógv fremmtant fólk kom til Føroya við øllum hesum skipum. Serliga umfatandi var tann danski-norski handilin við Amerika, meðan tað amerikanska frælsiskríggið leikaði á í 1770- og 1780 árunum, og handils- og siglingartjóðir sum bretar, fransmenn, hollendingar og spaniólar vóru uppí. Tá høvdu Danmark og Noreg stórar fyrimunir sum uttanveltað lond.

## Quillingsgarður

Til goymsluhúsið varð bryggjað bygd út úr Bryggjubakka, vegur varð lagdur eftir bakkanum niðaná og oman Bringsnagøtu og brúgv um ánna til Quillingsgarð, har bøkjaraverkstaðurin var undir leiðslu av manbúgvanum Michael John Quillin, við 16-18 bøkjarum. Teir flestu sum arbeiddu har vóru skotar, men har vóru eisini føroyingar og danir. Hetta hús var eisini samkomuhús ella klubbi hjá starvsfólkinum.

## Rundingur

Í Álakeri gjørdu teir Runding, sum var ríðingarbreyt hjá monnunum hjá Rybergs handli. Stórar nøgdir av tubbakki vórðu fluttar inn, tilvirkaðar á tubbaksspinnarínum í Vágsbotni og síðan fluttar út aftur. Í 1780 vórðu flutt inn 375.377 pund av tubakki, og 352.706 pund flutt út aftur. Í tubbaksspinnarínum arbeiddu tveir meistarar og nakrir føroyskir lærlingar.

## Royndarfiskiskapur

Ryberg fekk í 1772 loyvi til fiskiskap undir Føroyum og fiskatilvirking á landi. Hann læt byggja sluppina Færøe til hetta endamál, og ið hvussu er ein partur av fiskinum varð saltaður og turkaður til klippfisk, sum føroyingar tá ikki kendu til. Fiskiskapurin hjá Færøe var at rokna sum royndarfiskiskapur; og føroyingum dámdi lítið henda fyrsta skipsfiskiskap, og teir sendu inn klagur um hann. Færøe fiskaði tó í fleiri ár undir Føroyum og legði fiskin upp. Roynt varð eisini eftir sild, sum varð saltað í tunnur. Hetta hevði heldur ikki verið roynt í Føroyum áður.

## Handverkarar

Tað fjølbroytta virksemið hjá Rybergs handli hevði eisini givið nógvum føroyingum arbeiði, ikki bert til upp- og innskipan av farmi, men nógvir, serliga havnarmenn, lærdu har handverk, sum hesin handil dró við sær, sum bøking, timburarbeiði, skipasmíð, skrivstovuarbeiði o.s.fr.

## Frá aðalfundi Landsfelagsins, framhald av síðu 3



*Frá vinstru: Koos Kamminga, Bjarni Pétursson, Eli Brimsvík, Danjal Pauli Djurhuus og Petur Juul Jacobsen.*

sum koma til Føroya at arbeiða fáa betur sømdir enn føroyingar, sum gera sama arbeiði.

Ein trupulleiki er, at útlendingar, ið koma at arbeiða á t.d. fiskavirkjum fáa fasta løn. Tá fáa vit eina skipan, sum ger, at føroyskir arbeiðsgevarar vera noyddir at koyra føroyingar til hús, meðan útlendingarnar halda fram, og fáa nógv fleiri tímar og meira í løn enn føroyingarnir, sum gera sama arbeiði. Í veruleikanum verða útlendingarnir tryggjaðir við fastari løn, meðan føroyingar verða tímaløntir, og fáa minni inntøku enn útlendingarnir.

Í hesum máli var heilt greitt, at politiska skipanin ikki hevði hug at taka føroysku feløgini við uppá ráð; tað gjørdist skjótt greitt, at tað var sum, tá tosað verður fyri deyvum oyrum.

Niðurstøða var greið; landsstýrið var ikki





GOYM FRÆLSI
TÍTT GJALDOYRA
SENDISTOVAN
Hvør keyla hevur virði á 15 kr. og kann nýtast sum gjaldoyra á hesum støðum:
Kall handilin í SMS
Kall handilin á Óðinshædd
Kall handilin í Saltangará
Kall handilin í Klaksvík
City
Expert
Burger King
Williams
Sunset Boulevard
Pizza 67 í Tórshavn
Pizza 67 í Klaksvík
Trend Floor í Saltangará
Rafik'sa í Saltangará
J.A.P í Klaksvík
Fyri 5 keylur fært tú
eitt ókeypis atgongumerki til biografin
Fyri 6 keylur fært tú
ein ókeypis bowlingtíma
Tilboðið er galdandi til 1. juni 2008
kall
20 20 20

sinnað at viðgera teir trupulleikar, sum fara at stinga seg upp í hesum sambandi.

Eitt annað mál, sum Landsfelagið hevur arbeitt við, tók seg upp, tá skotið var upp at lækka ella avtaka endurgjald fyri lærlingar. Her meta vit, at vit gjørdu mun. Undir øllum umstøðum kunnu vit staðfesta, at málið er drigið út.

Tað sum liggur fast í løtuni er, at enn er onki uppskot komið úr landsstýrinum hesum viðvíkjandi. Tað var annars ætlanin.



## Skipasmiðjan

Á aðalfundinum varð greitt frá avtaluni, sum er gjørd við Tórshavnar Skipasmiðju viðvíkjandi útlendskari arbeiðsmegi. Í hesum føri snýr tað seg um serarbeiðarar úr Póllandi. Av tí, at vit ikki hava serarbeiðarar, við royndum og kunnleika innan skipasveising, hava vit funnið eina loysn, sum er til frama fyri allar partar.

Samstarvið við Skipasmiðjuna hevur verið gott, og tí var eisini greitt frá fleiri jaligum avleiðingum, sum henda avtala hevur haft við sær.

## Heimasíðan

Greitt var eisini frá nýggju heimasíðuni hjá felagnum, sum er á www.lfh.fo.

Heitt var á limafeløgini um at koma við nýggjum uppskotum til heimasíðuna. Ætlanin er, at heimasíðan skal útbyggjast og dagførast loypandi.

Víst varð eisini á, at neyðugt er, at limafeløgini koma við nágreiniligum upplýsingum um feløgini og, at vit í felag fáa heimasíðuna so góða sum gjørligt.

Øll leggja vit til merkis, at nógv orka verður brúkt til at kunna føroyskan ungdóm um útbúgvingarmøguleikar í øðrum londum. Onki ringt um tað.

Vit leggja eisini til merkis, at nógv verður gjørt fyri at kunna føroyskan ungdóm um gymnasialu útbúgvngarmøguleikarnar, sum eru i Føroyum. Onki ringt um tað.

Tað sum hinvegin undrar mong er, at lítið ella onki verður gjørt fyri kunna føroyskan ungdóm um yrkisútbúgvingarmøguleikar, sum hóast alt eru í Føroyum.

Tað átti, at sagt seg sjálvt, at hetta fær neiligar avleiðingar, og tí eiga vit at kanna, hví støðan er sum hon er. Her er helst onkur, sum ikki ger sítt arbeiði til lítar. Um tað er Yrkisdepilin ella onkur annar, tað vita vit ikki í løtuni. Semja var um, at Landsfelagið má gera alt, sum gerast kann fyri at bøta um støðuna.

## Umsettir sáttmálar

Havnar Handverkarafelag hevur tikið stig til at fáa okkara sáttmálar umsettar til onnur mál. Umsetingin til enskt er gjørd, og í løtuni verður arbeitt við at umseta til polskt.

**Framhald á síðu 30**

# Bíligari Betri Beinleiðis

**Endamál felagsins er at kunna selja eina fyrstafloks vøru til ein bíligan penga!**

import.fo



**Klædningurrin frá okkum er viðlíkahaldsfríur og hevur allar teir fyrimunirnir, sum træi hevur, men uttan vansarnar – sum gjørdur til føroyska veðurlagið!**

Vit kunna bjóða vindeygu og hurðar framleid úr plast, træ, mahogny, eik og alu-træ. Vit hava, stutt sagt: »vindeygu, tær tørvar, fyri prís, tú ynskir!« Nøgd, snið og stødd eftir tygara ynski, einki er standard.



Viðlíkahaldsfríur klædningur · Hurðar · Vindeygu

Skotarók 3 · Box 3070 · FO-110 Tórshavn · tel: 321 521 · import@import.fo · www.import.fo



# Tú ert handverkarin!

... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín

Vit kunnu bjóða
- spennandi arbeiðsuppgávur
- ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
- starvsfólkamenning
- trivnað

Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv

SENDISTOVAN

ELECTRIC

Hoyvíksvegur 53 · 100 Tórshavn · Tel 351220 · Fax 351230 · lm@lm.fo · www.lm.fo

LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice

**Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20**


Tú og e – vinna hvørja ferð!
e KORT
5412 3456 7890 1234
ELI M KORTENSEN
Eik Banki P/F er e kortútgevari
www.ekort.fo


BAXI KETIL
BALTIC CS 18-25Kw
Sera orkusparandi ketil frá BAXI.
CE góðkendir. DS/ISO 9001 góðkendir.
Við kappa til oljufýr
Ein tann mest orku-sparandi ketil á føroyska marknaðinum.
Síggj kanningina á www.sparolie.dk
Tórshavn:
Stiðjagøta 2 - Postboks 378
tel 30 93 10 - fax 30 93 11
Vágur:
Á Marknoyri
tel 37 35 35 - fax 37 35 65
demich

## Føroya Prentarafelag

Føroya Prentarafelag er nú limur í Landsfelag Handverkaranna. Harvið eru limirnir í Prentarafelagnum tryggjaðir á sama hátt sum aðrir limir hjá Landsfelagnum.

Nýggjur sáttmáli er undirskrivaður, sum eisini inniheldur eftirløn.

## Roknskapur fyri 2007

Ársroknskapur felagsins fyri 2007 varð lagdur fram til góðkenningar. Tað er Sp/f Menta, sum hevur grannskoðað roknskapin. Aðalfundurin góðkendi grannskoðaða ársroknskapin fyri 2007 einmælt.

Harumframt varð samtykt, at limagjaldið skal verða óbroytt. Limagjaldið verður tí framhaldandi kr. 250,00 um árið.

## Broyting av viðtøkum

Eitt av uppskotunum, sum var komið inn til aðalfundin at taka støðu til, var uppskot um broyting av viðtøkum felagsins. Í hesum sambandi samtykti aðalfundurin, at § 6 í viðtøkunum skal broytast soleiðis, at aðalfundurin verður hildin áðrenn 1. mai á hvørjum ári.

Víst var á, at neyðugt er at gjøgnumganga viðtøkurnar og gera neyðugar broytingar. Skotið varð upp, at ein viðgerð verður sett í gongd nú og, at møgulig broytingaruppskot verða løgd fyri komandi aðalfund. Aðalfundurin samtykti, at arbeiðast skal víðari við hesum.

## Arbeiðsskaðar

Til aðalfundin var komið inn uppskot um at arbeiða fyri, at lóg um arbeiðsskaðar verður sett í gildi í Føroyum. Neyðugt er at heita á politiska myndugleikan um at taka málið upp, soleiðs at vit fáa eina lóg á økinum.

Samtykt var at felagið skal arbeiða víðari við hesum máli. Um neyðugt saman við øðrum feløgum.

## Val av formanni og kassameistara

Til formansvalið varð Palli Djurhuus einmælt afturvaldur, og til kassameistara varð Dánjal Ludvig einmælt afturvaldur.

## Tilnevning av nevndarlimum

Fyri Vágs Handverkarafelag: Dánjal Ludvig og Olgar Mortensen; eykalimur teirra er Petur Hans Hentze.

Fyri Skála Handverkarafelag: Harald Østerø og Jóhannus Bertelsen; eykalimur teirra er Robert Jensen.

Fyri Tvøroyrar Handverkarafelag: Martin Øster og Emil Michelsen; eykalimur teirra er Trygvi Johannesen.

Fyri Havnar Handverkarafelag: Eli Brimsvík og Palli Djurhuus; eykalimur teirra er Jacobus Kamminga.

Fyri Føroya Prentarafelag: Hanna Michelsen og Bárður Kruse; eykalimur teirra er Ólavur Frederiksen.

rør-tænastan
Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión
Eyðfinn Hansen
í Geilini 5
FO-175 Kirkjubøur
Faroe Islands
tel./fax: +298 32 81 80
fartel.: +298 22 81 80
e-mail: eydfinnh@post.olivant.fo

# TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

- ✓ *Handverksútbúgvingar*
- ✓ *Støðisútbúgving*
- ✓ *Yrkisakademiútbúgvingar*
- ✓ *Skúlaheim*



*Marknagilsvegur 75 • Postboks 3239 • 110 Tórshavn • telefon 308050 • telafax 308051*

*www.tst.fo • tst@tst.fo*



www.sansir.fo

# Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bila søluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

*- so ert tú tryggari*

# Saman við okkum røkkur tú longri

FØROYABANKI

**Sum hollur viðleikari í vinnulívinum hevur Føroya Banki kunnleika og kapasitet til at fremja møguleikarnar í tíni fyritøku.**

**Í 100 ár hevur Føroya Banki vegleitt og fíggjað føroyskt vinnulív í góðum sum ringum. Hesa tíðina hava Føroyar verið fyri ovurstórari menning, og vit tora at siga, at Føroya Banki hevur verið ein týðandi partur av gongdini. Hesi 100 árini hava lært okkum nógv, og vit eru klár til meira.**

**www.foroya.fo**

SENDISTOVAN